## Fjórða heimatapið á rað

**Enn eina ferð legði KR sunnudagin rygg til tap á heimavølli, og ÍBV, sum skal spæla á Ólavsøku, tapti á heimavølli ímóti oddaliðnum FH**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað hevur gingið av skriðuni hjá KR. Heimadysturin ímóti Keflavík sunnudagin bendi ikki á, at vend er komin í hjá Rógva Jacobsen og teimum, eftir at teir fyri viku síðani vunnu stórt á útivølli ímóti botnliðnum Fram.

Keflavík vann 3-1 í Frostskjólinum. Hetta var fjórða ferðin á rað, at KR tapti á heimavølli, og tapið var nett tað sama, sum tað var, tá ið KR fyri tveimum vikum síðani tapti á heimavølli ímóti Fylkir.

Hesa ferð var KR á odda í steðginum. Miðvallarin Ágúst Þór Gyflason skoraði við skoti úr 20 metrum, tá ið fyrra umfarið var hálvrunnið. Sambært KR heimasíðuni hevði KR eftir hetta tveir góðar møguleikar at økja um leiðsluna. Rógvi Jacobsen, sum alla tíðina var í álopinum, sendi omanfyri málið, og hin álopsspælarin, Grétar Ólafur Hjártarson, sendi á málverjan hjá Keflavík.

Sjey minuttir eftir steðgin javnaði Keflavík, og seks minuttir seinni løgdu teir seg framum. Sigurin staðfestu teir, tá ið tað restaðu sjey minuttir.

B36 fær ólavsøkuaftan vitjan av ÍBV úr Oyggjunum í UEFA kappingini. Næstsíðsta hósdag endaði tað 1-1, tá ið ÍBV átti heimavøll ímóti B36. Á hesum sama vøllinum tapti ÍBV sunnudagin síðstu royndina, áðrenn teir í dag seta kós ímóti Føroyum. Oddaliðið úr Hafnafirði vitjaði, og FH vann 1-0. Hetta var 11. dysturin hjá FH í landskappingini, og teir hava framvegis fult stigatal.

Tríggir dystir eru eftir, áðrenn Landssimadeildin fer í summarfrí fram til 7. august. Í gjárkvøldið var lokaluppgerð millum tey bæði, sum hava tjóðarvøllin í Laugardali sum heimavøll. Tey eru Þróttur og Fram. Talan var um sanna botnuppgerð. Í kvøld eru tveir dystir á skránni - Grindavík fær vitjan av ÍA av Akranesi, og í Reykjavík verður lokaluppgerð ímillum Val og Fylkir.



*Fyriskipararnir eru væl nøgdir við súkklukappingina, sum júst er avgreidd Mynd: www.tsf.fo*

Kjartan Egholm, fyriskipari:

# Væl nøgdur

**Fyriskiparin av Statoil Kring Føroyar var væl nøgdur, tá kappingin var at enda komin. Hann hevði tó ynskt fleiri luttakarar**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Nú er tað tíggjunda árið á rað, at Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri súkklukapping kring Føroyar, og kappingin er allarhelst komin fyri at vera.

- Sum heild eru vit sera væl nøgdir við kappingina, og eg haldi, at vit eru slopnir undan barnasjúkum, sum vit drógust við tey fyrstu árini, sigur Kjartan Egholm frá Tórshavnar Súkklufelag.

Hann leggur afturat, at hann hevur eina kenslu av, at luttakararnir eisini eru nøgdir við kappingina í síni heild.

### Ov fáir luttakarar

Súkklufelagið hevur hvørt ár roynt at fingið fleiri súkklarar bæði úr Danmark og Íslandi, men tað hevur ikki gingið eftir vild.

- Vit ynskja okkum fleiri luttakarar, men tað hevur ikki eydnast nóg væl. Tað er eingin trupulleiki at umsita fleiri súkklarar, og vit høvdu klárað tvífalt so nógvar súkklarar, sigur Kjartan Egholm.

Ein av trupulleikunum hjá kappingini er, at hon ikki hevur gott orð á sær niðri í Danmark. Orsøkin til tað er ein hending fyri trimum ella fýra árum síðani, tá Rógvi Johansen møtti upp við einum liði.

Rógvi varð tveittur úr kappingini saman við sínum liðfeløgum, tí at fyriskipararnir ikki síggja liðkoyring í kappingini.
Tað stóðst eitt sindur av roki í føroyska súkkluheiminum av hesum, og tað hevur skatt umdømið hjá kappingini niðri.

Uttan at taka støðu til hvør av pørtunum hevur grein í sínum máli, kunnu vit staðfesta, at tann hendingin hevur havt keðiligar avleiðingar fyri Statoil Kring Føroyar.

### Góðar vónir

Kjartan Egholm hevur tó góðar vónir um, at tað fer at eydnast teimum at skapa sær eitt gott umdømi við tíðini.

- Vit í súkklufelagnum hava ongantíð verið úti og gjørt viðmerkingar til tað, sum hevur verið skrivað um tað hendingina. Vit royna bara framhaldandi at gera eitt gott arbeiði og byggja víðari á tað fundamentið, sum vit hava, sigur Kjartan Egholm.

Annars sigur fyriskiparin av kappingini, at súkklararnir vórðu væl móttiknir allastaðni kring landið, og serliga í Suðuroy var áhugin fyri kappingini stórur.

## Súkklari meiddi seg

ÓHAPP
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Ein danskur súkklari var óheppin á teininum á Streymoynni í gjár, tá nøkur neyt fóru tvørturum vegin, júst tá hann kom við fullari ferð ígjøgnum Saksunardal. Talan var um unglingasúkklaran Nikolaj Jacobsen, sum heldur enn at stoyta saman við neytunum valdi at koyra útav.

Sólbrillurnar góvu honum eina fliku í kjálkan, og hann fekk nakrar pentur. Eisini skurslaði hann seg illa. Hann varð fluttur á Landssjúkrahúsið beinanvegin, og hann hevur ikki fingið nakað verandi mein av fallinum.




*Góða Lotte*

Nú ið tú fer av landinum aftur, takka vit tær fyri árini í felagnum. Takk fyri arbeiðið títt við yngru leikarum okkara og tín lut í felagsarbeiðinum annars.

*Vit ynskja tær alt tað besta í nýggja starvinum*

Kyndil